# Kanna hund fyri orm í Føroyum

HUNDAKANNING
*Tíðindaskriv*

Nú ber til ókeypis at fáa hund tygara kannaðan fyri orm. Kristina Dahl Joensen og Signar Petersen, sum lesa til djóralækna, fara í sambandi við serritgerð sína at kanna títtleikan av endosníkum (ormum) í hundi í Føroyum.

– Av tí at nógvir hundar koma til Føroya, vænta vit, at summir hundar bera smittu. Tað kann vera ógvuliga óheppið, tí at teir kunnu smitta onnur dýr og fólk, serliga børn, siga tey bæði.

Ormur smittar við skarninum, og summi ormasløg koma undan við lívinum í umhvørvinum í fleiri ár. Tí er smittuvandin ógvuliga stórur, og tí er umráðandi at viðgera fyri orm.

Vit vita, at bendilormur og spolormur eru í hundi í Føroyum. Í grannalondum okkara eru onnur ormasløg, sum eru til bága, tí er týdningarmikið og áhugavert at fáa tað kannað í Føroyum.

Til dømis kann vera nevnt, at fyri nøkrum fáum árum síðani varð hjarta - lungnaormur (Angiostrongylus vasorum) funnin í Danmark.

Hundar við hesum ormi hava trupulleikar í andaleiðini. Sjúkuavgerðin, sum tikin varð, var skeiv, og tí fingu hundarnir skeiva viðgerð, til greiða var fingin á, at tað var sníkur, sum var trupulleikin.

Kristina og Signar vænta ikki at finna henda sník í hundum í Føroyum, men tó halda tey, at tað er umráðandi at vera varin.

Tað er ógvuliga týdningarmikið at fáa so nógv tilfar til vega sum møguligt, so at vit fáa at vita, hvussu stórur trupulleikin er.

Tí verður mælt hundaeigarum til at seta seg í samband við tey bæði, so at so nógvir hundar, sum gjørligt kunnu verða kannaðir.

Fólk, ið hava áhuga fyri at fáa hund sín kannaðan fyri orm, kunnu seta seg í samband við Kristinu ella Signar at ringja á telefon 509048 ella 253712, ella senda teldupost til krull@dsr.kvl.dk ella signarp@dsr.kvl.dk.

VIÐMERKINGAR

## Inger Krause Jensen – Syrgjandi einkja ella?

**Petur S. Johannesen**
*Vágur*

Johan Dahl bleiv avhøvdaður fyrst og fremst av sínum egnu nevniliga fyrrv. tingmanninum Heðini Mortensen og restini havnar–sambandsklaninum, og seinasta seymin í kistuna setti so Inger Krause Jensen og dóttir hennara vit teirra sera skitnu og ærumeiðandi grein í Fregnum undir heitinum »Johan Dahl hevur forpestað mítt lív«. Síðani metti løgmaður, at Johan Dahl mátti frá, tí samgongan/landsstýrið skuldi hava arbeiðsfrið!

Ikki eiti á samband/samgongu stuðlum og ikki eiti á sterkari útsøgn.

Spurningurin sum eftir stendur er nú, um tað veruliga er so, sum Inger Krause Jensen førir fram - hevur hon nú veruliga goldið alt hetta, sum hon sigur seg hava?

Sambært notatinum hjá Anfinn V. Hansen, so er myndin just tann øvugta- tað eru nevniliga Johan Dahl, konan hansara og Petur Nolsø sum hava goldið gildið, meðan partafelagið P/F C.C. Johansen betalti í 1994 kautión uppá 550.000, - og sum ein og hvør veit, so er tað altso ikki Inger Krause Jensen, tí hon er ikki eitt partafelag.

Við øðrum orðum, hon hevur inntil 1999 als onki goldið fyri Johan Dahl.

Hvar fór so tann upphædd upp á Kr. 227.000, sum Johan Dahl hevur goldið til Inger Krause Jensen kann ein spyrja?

Góður spurningur - tí hon er ikki komin inn á lánið hjá Nautilus sambært Anfinn V. Hansen.

Hvar er hon so farin? Man upphæddin verða farin inn á teirri í notatinum nevndu millumrokningina hjá P/F C.C. Johansen, til at gjalda yvirforbrúkið hjá Inger K. Jensen og dóttrini, altso tær 300.000, sum eru hevaðar kontant, uttan at skattur er goldin av teimum kann ein ganga út frá .

Kanska Inger K. Jensen og dóttirin kundu sagt okkum, um skattur er goldin av hesum hevaðum upphæddum, tí tað er ikki loyvt at heva pening úr partafelag til egið brúk, uttan at gjalda skatt eins og tað heldur ikki er loyvt at geva partaeigaralán uttan renturokning.

Sum skilst so slapp Inger Krause Jensen við skrekkinum og slapp at gjalda 450.000 fyri alt millumverandi við búgvið hjá P/F C.C. Johansen, men eg gangi út frá, at hendan upphædd eisini umfatar tær góðar 300 túsund, sum hon hevur brúkt sjálv, og so eina arða kautión umframt Nautilus kautiónina, sum eg havi fingið at vita eisini bleiv goldin sama dag, sum tann hjá Nautilus (Johan Dahl) .

Er hesin persónur eisini kravdur at gjalda sína upphædd aftur, ella er tað bara Petur Nolsø, sum medkautionistur hjá Johan Dahl, sum bleiv kravdur og dømdur, tá ikki kundi farast eftir Johan Dahl orsakað av gjørdu avtaluni, sum gjørd var í 1994 samb. notatinum frá Anfinni V. Hansen?

Skilji eg sakina rætt, so hevur Johan Dahl gjørt avtalu við Inger Krause Jensen og goldið hesa.

Eisini gjørdi hann avtalu við Petur Nolsø og Føroya Banka og hevur goldið hesar og skuldi sostatt verið leysur

Sig mær so hvar trupulleikin er?

Her sær alt út til at verða ruddað av vegnum, og løgmaður metti ikki at óseriøsu álopini á Johan Dahl í Fregnum borga fyri friði í samgonguni, og tí mátti Johan Dahl fella, ja avgerðin talar fyri seg sjálvari, lat meg siga eitt afturat um Johan Dahl.

Johan Dahl kom heim aftur til Vágs eftir at hava verði í svárum fíggjarligum trupulleikum (Skipasmiðju/-Garðarnar - fallitið), var noyddur at fara til Bretlands fyri at fóta sær aftur, men hevði áræði og mót til at byrja av nýggjum aftur í Vági, og bygdi frystihúsið á keiini í Vági saman við øðrum, og sum hevur goldið teimum, sum hava lagt pening út hansara vegna, sambært notati hjá Annfinn V. Hansen, tað hann skyldar.

Tað kalli eg at hava bæði rygg og moral.

Tað er meir enn sigast kann um teir og tey, sum nú stinga hann í ryggin.

Churchill bleiv einaferð spurdur, um hann ikki hevði nógvar fíggindar framman fyri sær í politiska lívið sínum, og hann svaraði nakað soleiðis:

»Tað finnast eingir fíggindar framman fyri mær í politiska lívi mínum, teir sum eg havi eru allir aftan fyri meg«.

Nakað soleiðis kundi eg hugsað mær, at Johan Dahl hugsar í hesum døgum, nú hansara egnu partamenn og løgmaður stungu hann í ryggin.

Bæði tit og Jóannes mugu hava ringan smakk í munninum eftir at hava avhøvdað ivaleyst besta fiskimálaráðharra, vit kundi hava havt nakrantíð.

Sambandsmenn - standi saman um hendan tingmann tykkara.




# Lánsbrævarentur á lægsta stigi í ár

Bæði tær stuttu og longu donsku lánsbrævarenturnar lækkaðu í farnu viku og liggja nú á lægsta stigi í ár. Hóast partabrøv sum heild lækkaðu farna mánadag orsakað av vinningsstaðfestingum, stóðu eisini hesi seg væl í vikuni.

Í einari røðu til amerikanska umboðsmannatingið, var Greenspan bjartskygdur um amerikanska búskapin, men segði tað vera umráðandi at halda eyguni eftir hallinum á gjaldsjavnaðnum; hetta fekk dollaran at styrkna og partabrøv at hækka. Hóast hansara bjartskygni metir Kaupthing framvegis, at útlit eru fyri, at dollarin aftur kann vikna. Eisini tær bjartar búskaparuppgerðinar úr USA fingu partabrøv sum heild at hækka í farnu viku.

Eitt áhaldandi trýst á evropisku lánsbrævarenturnar og óttin fyri vantandi búskaparvøkstri, fekk í farnu viku týska stjørnarleiðaran Gerhard Schröder at siga, at evropiski miðbankin (ECB) eigur at lækka teirra leiðandi rentu samsvarandi. Hóast miðbankin ikki er samdur í hesum, er ein lítil møguleiki fyri, at um evran styrknar aftur til áleið 1,35-1,40 mótvegis dollaranum, kann hetta føra við sær lækkandi evropiska leiðandi rentu.

Roknskapurin hjá GN Store Nord, ið varð kunngjørdur í farnu viku, var sum so góður; tó hevur GN ikki funnið vakstrarstevið enn og metingarnar fyri 2004 stóðu ikki mát við vónirnar. GN lækkaði tí 1,5%. Hesa vikuna kunngerð danska fjarskiftisvirkið TDC roknskap.

Bæði partabrøv og lánsbrøv hava staðið seg væl í seinastu vikurnar og tískil er allatíðina væntandi, at ein stuttur steðgur kemur í góðu gongdina, har íleggjarar fara at staðfesta vinningin. Hetta og gjaldoyrastøðan fer sannlíkt at seta dám á marknaðirnar næstu vikurnar.

Hesa vikuna verður serliga spennandi hvussu álitið hjá amerikansku framleiðsluvinnuni er á búskapin. Hósdagin hevur ECB rentufund, men teir fara ikki at broyta rentustigið. Tó kunnu viðmerkingar um gjaldoyrastøðuna ávirka marknaðirnar. Kaupthing roknar við, at renturnar kunnu vera støðugar í vikuna, meðan partabrøv hóast alt, kunnu standa seg væl.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,48% | -0,10% |
| 5 ára lánsbræv | 3,54% | -0,09% |
| 10 ára lánsbræv | 4,22% | -0,07% |

**Partabrævavisitol**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 277,5 | 2,1% |
| OMX, Sveriki | 698,3 | -0,8% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.775,5 | 0,3% |
| S&P 500, USA | 1.144,9 | 0,3% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 109,26 | 0,3% |
| Evru Lánsbrøv | 165,77 | 0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 79,99 | -0,9% |
| Altjóða Vøkstur | 63,92 | 0,5% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 596,61 | 0,5% |
| EUR | 745,19 | 0,0% |
| GBP | 1.116,07 | 0,7% |
| NOK | 85,38 | 0,8% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Jógvan Sundstein sigur farvæl

**- Tað besta, sum er hent í føroyskum politikki í mong ár, er skerjingin í blokkinum. Hetta er ein stórsigur fyri samfelagið. Var blokkurin ikki skorin, vóru vit verri fyri í dag og meira heft av øðrum. Tað er ógvuliga stutt skygt at halda, at var eingin niðurskurður í blokkinum, hevði alt lagað seg, nú ein ávís kreppa bankar á dyrnar. Niðurskurðurin gevur okkum ábyrgd**

SAMRØÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Fyrst í apríl mánaða flyta Jógvan Sundstein og konan, Lydia, niður til Danmarkar at búgva. Tey hava keypt sær eina íbúð í Holdbæk*

Um nakrar vikur flyta Jógvan Sundsstein og konan, Lydia, niður til Danmarkar at búgva. Hjúnini, sum bæði eru farin um tey sjeyti, hava keypt sær eina hugnaliga íbúð í býnum, Holdbæk, har dóttir teirra býr saman við manni og trimum børnum. Jógvan og Lydia eiga tilsamans trý børn; elsti sonurin, ið gjørdist blindur sum sjey ára gamal eftir eina skurðviðgerð, býr Grindsted á Jútlandi og yngsti sonurin, sum eisini er giftur og eigur trý børn, býr í Keypmannahavn.

Seinastu 20 árini hevur einki av børnunum búð í Føroyum og tann, ið hevur verið longst burtur, er Hans Pauli, sum flutti niður til Danmarkar at búgva um 20 ára aldur. Hans Pauli er í dag 47 ára gamalur. Hóast hann hevur verið blindur, síðan hann vaknaði upp eftir skurðviðgerðina, er Hans Pauli kønur innan teldutøkni.

### Keypt íbúð

– Vit hava ikki ásett dagin, tá ið vit flyta, men tað verður helst ein av fyrstu døgunum í apríl.

Spurdur, um hann og konan leingi hava umhugsað at flyta niður til Danmarkar at búgva, sigur Jógvan:

– Nei, tað hava vit ikki. Hetta hevur verið uppi og vent av og á, men síðan er ikki meira hent. Vit tóku avgerðina í heyst, tá ið vit vóru í Holdbæk og ferðaðust hjá dóttrini. Á ferðini komu vit fram á eina serstakliga hugnaliga íbúð, sum vit fullu fyri. Vit keyptu íbúðina og eru nú í ferð við at selja húsini, vit eiga her heima.

Jógvan ásannar, at tað hevur verið viðvirkandi til endaligu avgerðina, at øll børnini búgva í Danmark.

– Vit flyta niður, og ætlanin er ikki at koma heimaftur til Føroya at búgva. Tað merkir tó ikki, at vit ikki koma heimaftur at ferðast, tí ferðamøguleikarnir millum londini eru so góðir í dag.

Jógvan og Lydia hava búð í umhvørvinum úti í Skákinum í Grønlandi heilt síðan 1964, tá ið hann eftir lokna útbúgving kom heimaftur til Føroya at búgva.

– Og her, sum vit búgva nú, hava vit búð síðan 1973, sigur hann.

### Samskiftismøguleikar

Spurdur, um avgerðin at flyta av landinum, var tung at taka hjá honum og konuni, sigur Jógvan:

– Jú, tað er tungt at skula taka eina slíka avgerð, men tá ið hon er tikin, venur tú teg við, at soleiðis verður.

Sum aktivur í politikki í samfull 24 ár, hevur Jógvan stóran áhuga fyri samfelagsviðurskiftum, og nú tey gera klárt til at flyta, fegnast hann um, at samskiftis- og kunningarmøguleikarnir eru so góðir.

– Við teirri tøkni, sum er í dag, er einki til hindurs fyri at verða kunnaður og uppdateraður um alt, sum gongur fyri seg, og tað hevur nógv at siga fyri meg, sigur Jógvan.

Nú tey bæði flyta til Danmarkar, verða tey nærri børnunum og abba-og ommubørnunum.

– Vit koma sum nevnt at búgva í sama býi sum dótturin við manni og trimum børnum, og møguleikarnir at vitja hini bæði børnini verða eisini betur, tá ið vit eru niðri. Eg haldi, at børnunum dámar væl, at vit koma niður at búgva. Tað siga tey í hvussu er, sigur Jógvan læandi.

Hann vísir á, at eftir eitt lagt lív í Føroyum, hava tey sjálvsagt nógv vinfólk og skyldfólk her heima á klettunum.

– Men eg haldi, tey skilja okkum, nú vit flyta niður at búgva, sigur hann.

### Gevst ikki

Jógvan Sundstein gjørdist løggildur grannskoðari – ella statsautoriseraður revisor, sum tað verður rópt á donsum – í 1962, og í fleiri ár stóð hann á odda í egnari grannskoðarafyritøku, sum seinni fekk heitið, Inpact. Fyri fáum árum síðan gavst hann við hesum virksemi, ið Jógvan Amonsson, sum eisini er løggildur grannskoðari, tók yvir.

Seinastu árini hevur Jógvan saman við soninum, Eivindi, rikið felagið, JSS Consult, ið fæst við ráðgeving og íløguvirksemi.

Í Danmark hevur Eivind felagið, Enviro, sum eitt nú fæst við umhvørvi og harímillum reinsiskipanir til vatn. Hansara virksemi er ikki ókent í Føroyum, har kommunur og virkir hava sett upp slíkar reinsiskipanir. Eivind arbeiðir eisini við øðrum verkætlanum, og ein av hesum snýr seg um roykjing av matvørum, har sleppast kann undan eitrinum í roykinum. Roykingin fer fram á tann hátt, at bert tann reini roykurin – uttan eiturevni – er eftir.

Jógvan sigur, at Eivind hevur fingið patent uppá skipanir, sum gera matvøruna nógv reinari og betur.

– Eg vóni, at eg Eivind fara at samstarva nokso nógv í Danmark, og annars er ikki ætlanin at avtaka felagið, JSS Consult, sum vit báðir eru saman um, sigur hann.

### Politiska lívið

Jógvan Sundstein varð valdur á ting fyrstu ferð í 1970 og sat øll árini, til hann ikki læt seg stilla uppaftur til valið í 1994.

Hann var løgmaður árini, 1989 til 1991 og fíggjarmálaráðharri árini, 1991-1993, bæði við Atla Dam og Maritu Petersen sum løgmanni.

– Tá ið eg gjørdist løgmaður og seinni fíggjarmálaráðharri, var samfelagið komið í eina rættiliga djúpa kreppu, og vit høvdu eina ógvuliga stóra nettoskuld. Vit sóu okkum noyddar at spara, og tá ið danir so eiggiliga eisini skrúvaðu fyri, slóð hetta fullkomiliga føturnar undan øllum. Tað var búldur omaná sár.

Jógvan heldur ikki, at útlitini í Føroyum eru so døpur í dag, hóast vit merkja eina ávísa kreppu.

– Støðan er ein heilt onnur í dag enn fyrst í nítiárunum. Í staðin fyri at hava eina stóra nettoskuld, hevur samfelagið nú eina stóra nettoogn, og tað kann slett ikki samanberast. Føroyar eru vorðnar nógv meira fjølbroyttar, og vit eru minni bundin av tí, vit fáa aðrastaðni. Ríkisstuðulin er minkaður, og tað merkir, at vit sjálvi hava eina tilsvarandi størri ábyrgd, sum heilt avgjørt kemur at tæna okkum í eini kreppu og í framtíðini annars.

Hann heldur, at vit bæði politiskt, vinnuliga og fíggjarliga eru nógv betur fyri í dag enn fyri 10 árum síðan.

– Vit duga betur at síggja heildina og seta í verk tiltøk, sum kunnu skapa nakað heldur enn sláa føturnar undan okkum. Nú skulu vit stýra við skili og undir teirri ábyrgd, ið liggur á okkum.

### Blokkurin

Spurdur, um hann ikki heldur, at spardu miljónirnar í blokkinum høvdu komið væl við í dag, sigur Jógvan:

– Nei, tað besta, sum er hent í føroyskum politikki í mong ár, er skerjingin í blokkinum. Hetta er ein stórsigur fyri samfelagið. Var blokkurin ikki skorin, vóru vit verri fyri í dag og meira heft av øðrum. Tað er ógvuliga stutt skygt at halda, at var eingin niðurskurður í blokkinum, hevði alt lagað seg. Um niðurskurðurin ikki varð framdur, høvdu vit satsað tilsvarandi hægri í dag.

Jógvan sigur seg vóna, at føroyskir politikarar halda fast um niðurskurðin, og heldur minka uppaftur meira um blokkin so hvørt, sum umstøður eru til tess.

– Hetta kemur avgjørt at tæna føroyska samfelagnum best í longdini.

Hann sigur seg harmast um, at samgongan, sum hevur sitið farnu seks árini, ikki helt fram.

– Mær hevði dámt betur, um tann samgongan sat í friði og náðum, helt fast um vunnin rættindi og annars skapti tann stabilitet, sum skal til fyri at røkka tí málið, samgongan setti sær. Nú vit hava eina aðra samgongu, er at vóna, at hon heldur fast um vunnin rættindi og annars fær sum frægast burtur úr, soleiðis sum støðan er.

Jógvan Sundstein leggur at enda dent á, at vit ikki eiga at lata okkum ríva av fótum, um eitt lítið illveður er beint nú.

– Eg eri ikki dapurskygdur, nú vit flyta av landinum, sigur hann at enda.